# So kom hon endiliga...

FLYTING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Eftir nógv umtalaðu flytingina av Strandferðsluni er sjálv flytingin nú komin upp á pláss. Klokkan níggju fyrrapartin lat stovnurin hurðarnar upp á Tvøroyri fyri almenninginum, har móttøka var í Sjógøtu 5, sum er nýggi bústaðurin hjá Strandfaraskipum Landsins. Nógv nýttu sjálvandi høvi at síggja stásiligu hølini hjá stovninum.

Orsakað av illveðrinum var Smyril seinkaður av Tvøroyri í morgum, men náddi næstan at verða aftur har suðuri til tíðina við gestum til móttøkuna.

Døgurði var á Beinisvørð matstovu umborð, og gestirnir fingu eisini eina rundvísing á Smyrili.

Á Tvøroyri var høvi at síggja nýggja bygningin, umframt at okkurt lætt var til matna.

Smyril skuldi fara av aftur Krambatanga klokkan 19.



*Mynd frá móttøkuni hjá Strandferðsluni á Tvøroyri fyrrapartin*





## Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar skúlaárið 2008/2009

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 2002 í 1. flokk í Tórshavnar kommunalu skúlar næsta skúlaár, verða biðin at siga frá týsdagin 29. ella mikudagin 30. januar 2008.

Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum, men um pláss ikki er fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í kommununi, verður neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fáa skúlarnir og foreldrini boð um, í hvønn skúla næmingar skulu koma í 1. flokk.

## Innskrivingin

**Skúlarnir í høvuðsstaðarøkinum**

**Argja skúli**
**Venjingarskúlin**
**Tórshavnar Kommunuskúli**
**Sankta Frans skúli**
**Eysturskúlin**
**Hoyvíkar skúli**
**Skúlin við Løgmannabreyt**

**Innskrivingin er í býráðssalinum týsdagin 29. og mikudagin 30. januar, báðar dagarnar frá kl. 15-18.**

Havið avrit av dóps-/navnabrævi við.

Eisini ber til at ringja í býráðssalin somu tíð á telefon 25 40 10.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til frítíðarskúlan í Snarskivuni, á heimasíðu kommununnar www.torshavn.fo ella á telefon 30 20 10.

## Skúlarnir aðrastaðni enn í høvuðsstaðarøkinum

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **týsdagin 29. januar, kl. 15.30.**

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum **mikudagin 30. januar, frá kl. 15-17** ella á telefon 30 25 20.

**Velbastaðar skúli**
Innskrivingin í Velbastaðar skúla er í skúlanum **mikudagin 30. januar, frá kl. 15-17** ella á telefon 30 25 05.

**Nólsoyar skúli**
Innskrivingin í Nólsoyar skúla er í skúlanum **týsdagin 29. januar, frá kl. 18-19** ella á telefon 30 24 65.

**Hests skúli**
Innskrivingin í Hests skúla er í skúlanum **mikudagin 30. januar, frá kl. 15-17** ella á telefon 32 81 07 / 26 92 46.

Havið avrit av dóps-/navnabrævi við.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til frítíðarskúlan í Snarskivuni, á heimasíðu kommununnar www.torshavn.fo ella á telefon 30 20 10.

**Meiri fæst at vita**
um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, mentamálaleiðara, telefon 30 20 10.

Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar
**Mentamáladeildin**

**Tórshavnar kommuna**